Fagnaðu Sunleifi Rasmussen:

# Uttan tónleikarar hevur tónaskaldið hvørki armar ella bein

**Hóskvøldið var móttøka í Norðurlandahúsinum í sambandi við, at Sunleif Rasmussen hevur vunnið tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins. Á móttøkuni bóru fólk fram røðu, har Kristian Blak, formaður í Felagnum fyri føroysk tónaskøld, segði, at Sunleif Rasmussen eigur eitt pláss ímillum tey kendu heimsnøvnini**



*Eisini mentamálaráðharrin, Annlis Bjarkhamar nýtti høvið at ynskja tónleikaskaldinum tillukku*

MÓTTØKA
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Heilt fitt av fólki var komið saman í Norðurlandahúsinum at heiðra Sunleif Rasmussen, sum júst er komin aftur úr Danmark, eftir tað er vorðið kunngjørt, at hann verður tann, ið fær tónleikavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum í ár.

Millum tey, ið eru komin saman, er eisini beiggi Sunleif, Oddfríður M. Rasmussen, sum er komin at ynskja beiggja sínum tillukku. Eisini er nýggi mentamálaráðharrin, Annlis Bjarkhamar, saman við floksfelaganum, Høgna Hoydal, komin at heilsa uppá Sunleif.

Klokkan ringir, og boðið verður innar í Klingruna. Klingran er næstan fullsett, og byrjað verður við Aldubáruni, Onnu E. Klett á klarinett og Páll Sólstein á horni. Tey spæla eitt verk eftir Sunleif Rasmussen, sum er eitur Fantasi yvir Tívilsdøtur frá 1990.

Helga Hjörvar bjóðaði síðani vælkomin.

– Tað er ikki bara tónaskaldi sum fær æru av at vinna eina tílíka virðisløn, men eisini landið og tjóðin. Tónleikur er eitt altjóða mál, sum ein kann bera fram allastaðni í heiminum. Vit her í Norðurlandahúsinum eru ógvuliga stolt av at vera tey fyrstu í Føroyum, sum hava verið karmur um fyrstu føroysku symfoniina, segði Helga Hjörvar millum annað í røðu síni.

Eftir Helgu kom Kristian Blak á pallin. Hesuferð umboðandi Felagið fyri føroysk tónaskøld. Hann greiddi frá um summartónar, sum mánadagin fara av bakkastokki fyri 13. ferð.

– Virðislønin Sunleif hevur vunnið er grundað á hansara egnu menning sum tónaskald. Vit í felagnum fyri føroysk tónaskøld hava millum okkum sagt, at vit hava roknað við tí, og vit hava eisini verið við til at innstilla hann til virðislønina, og nú er tað stuttligt at síggja úrslit. Sunleif eigur veruliga pláss ímillum tey kendu heimsnøvnini, var nakað av tí, Kristian Blak segði í røðuni.

## Álitisváttan

Tá Kristian Blak var liðugur við sína røðu kom Jóannes Andreasen á pallin og sessast við klaverið. Hann spælir verkið »Sum hin gylta sól«, eisini eftir Sunleif Rasmussen. Hetta er eitt verk, komponerað til klaver og effektir, og var tað ein serstakur dámur á tí. Hátalararnir virka sum eitt slag av ekkó, meðan Jóannes hugtekur allan salin við tónleikinum. Tá hann hevur spælt eina løtu, tekur hann fremsta partin av klaverinum vekk og spælir víðari. Brádliga reisir hann seg upp, og byrjar eisini at spæla upp á streingirnar inni í klaverinum, og gav hetta eina heilt serstaka kenslu.

Mentamálaráðharrin, Annlis Bjarkhamar. Hon segði millum annað, at hetta er eitt tekin um tíðarinnar skapandi eginmáttar í Føroyum.

Ein dygg álitisváttan og nógv onnur rósandi orð vóru havd á munni á móttøkuni hóskvøldið.

– Tíbetur, segði mentamálaráðharrin, – hevur góð list onki við stødd á landinum ella fólkatal at gera. Tónleikur er eitt av bestu umboðunum fyri Føroyar í útlandinum, og hetta vísir, at vit skulu ikki smæðast burtur í altjóða høpið. Tað er Sunleif prógv uppá.

Sunleif sjálvur nýtti høvið at takka øllum, sum saman vóru komin, og tók til orðanna:

– Eg vil serliga takka tónleikarunum í Aldubáruni, sum hava framført mín tónleik, tí uttan tónleikarar hevur eitt tónaskald hvørki armar ella bein.

Endað varð við tónleiki til eina yrking hjá Williami Heinesen, Hoyrdu tit havsins andalag, sum Anna E. Klett og Andrea Heindriksdóttir framførdu á klarinett og floytu.



*Sunleif Rasmussen avmyndaður saman við konu og dóttir í Norðurlandahúsinum hóskvøldið*



*Sunleif Rasmussen situr hugtikin og lurtare meðan Aldubára verk hansara*



Fyrsti studenturin í ár:

# Til Sands at yvirraska ommuna

**Ein av próvtakarunum á Studentaskúlanum í Hoydølum í gjár var Áki Joensen úr Havn. Hann er spastikari, men hóast hetta hevur hann megnað at gjøgnumføra skúlan og fyrrapartin í gjár fekk hann húgvuna á høvdið, júst sum floksfelagar hansara**

PRÓVTØKA
*Ingrid Bjarnastein*

Tann fyrsti og einasti próvtakarin í religión fyrrapartin í gjár var Áki Joensen. Og stoltur og glaður kom Áki út aftur úr próvtøkuhølunum og lítla løtu aftaná kom húgvan á høvdið og eitt níggju tal í prógvið.

Umframt at hava fingið húgvuna, so er Áki tann fyrsti studenturin í Føroyum í ár. Floksfelagar hansara verða ikki lidnir fyrr enn 24. og 25. juni.

– Hetta kennist deiligt, sigur nýklakta pisan, Áki Joensen, stórflennandi.

– Nú fara vit til Sands at yvirraska ommuna, tí hon veit als ikki av, at eg havi fingið húgvuna í dag.

Áki var sum vera man ógvuliga glaður fyri at hava fingið húgvuna. Fýra ár hevur tað tikið honum, men øll á skúlanum vóru ógvuliga stolt av honum. Eisini rektarin, Mads Winther, segði at hann hevur klárað seg ótrúliga væl.

Ein stolt mamma og beiggi vóru hjá honum, tá vit fangaðu tey uppi við Ternubúðina fríggjamorgunin, og tey vóru sum vera man eisini ógvuliga fegin og stolt.

Frá Sosialinum verður Áka við familju ynskt hjartaliga tillukku.



*Áki Joensen, sum er spastikari, fekk í gjár studentarhúgvuna á høvdið og eitt níggju tal í prógvið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eitt nýtt amboð til ferðavinnuna

**Ferðaráð Føroya hevur í samstarvi við Økisferðavinnufeløgini og Team 85 givið út fimm økisfaldarar. Talan er um fimm faldarar úr Suðuroy, Sandoy, Skúvoy og Stóru Dímun, Vágum og Mykinesi, Eysturoy og Norðoyggjum**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

Endamálið við faldarunum er at lýsa oyggjarnar og tær upplivingar hesar bjóða tí vitjandi.

Á móttøku í Smiðjuni í Lítluvík segði Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráðnum, at hetta er eitt stórt konsept, sum hevur verið fyrireikað síðani februar mánaða.

– Vit hava bíðað leingi eftir hesum faldarunum. Ætlanin var, at teir skuldu vera seks, men tann sætti faldarin um Streymoynna, er so mikið umfatandi, at hann er ikki liðugur enn, men hann ávegis. Faldararnir lýsa oyggjarnar og upplivingar kring landið og eyðkenna økið teir umboða, sigur Heri Niclasen.

Tað er Birita Nolsø, sum hevur staðið fyri megin-partin av arbeiðinum. Hon hevur í tøttum og góðum samstarvi við økisferðavinnufeløgini skapað fimm snøggar og litríkar faldarar. Faldararnir eru tøkir á enskum og á donskum, og eru lættir og einfaldir at lesa.

– Vit vóna, at hetta verður væl móttikið. Faldararnir koma at liggja á ferðavinnuskrivstovum, kunningarstovum, umborð á Strandfaraskipunum, flogvøllinum, Norrønu og aðrastaðni tørvur er á teimum, greiðir Heri Niclasen frá.

– Ógvuliga umráðandi er, at upplýsingarnar eru so rættar sum gjørligt, tí ætlanin er, at faldararnir skulu vera á marknaðinum í tvey ár.

Á móttøkuni varð borðreitt við ymsum rættum frá teimum ymsu økjunum. Á borðinum stóð millum annað turkað gás, súla, veðrakjøt, fiskur, lundi og nógv annað gott. Ein hugnaligur dagur í juni, nú háárstíðin viðvíkjandi ferðavinnu veruliga er við at taka dik á seg.



*Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya, saman við Biritu Nolsø, sum hevur gjørt faldararnar*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fyrsta Clickhaze fløgan á gøtuni

**Clickhaze kom í gjár út á marknaðin við síni fyrstu fløgu. Á fløguni eru seks løg, harav trý av teimum eru upptikin live og trý eru spæld inn í Lundgaard Studios í Danmark**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

– Grundin til, at vit ikki eru komin út við eini fløgu fyrr enn nú er, at vit hava hvørki havt pening ella umstøður til tess, sigur annar av gittarleikarunum í Clickhaze, Jón Tyril.

Tey trý løgini, sum eru upptikin í studio var vinningurin frá Prix Føroyar kappingini í 2001, og tóku tey eina viku at taka upp. Síðani er arbeitt víðari við teimum bæði í Føroyum og Danmark. Óli Poulsen hevur mixað løgini í Fix-N-Mix Studio. Live-løgini eru upptikin á Prix Føroyar 2001 í Norðurlandahúsinum, og hevur Finnur Hansen í útvarpinum mixað tey løgini.

Fyri framman hjá bólkinum er skráin long. Nú í juni og juli mánaða skulu tey spæla á Roskilde Festivalinum, Nibe Festivalinum og Midtfynsfestivalinum. Í august mánaða gongur leiðin til Grønlands og í oktober mánaða skulu tey spæla í Noregi.

– Fløgan ger tað lættari hjá okkum at gera vart við okkum uttanlands, sigur Jón Tyril.

– Soleiðis kunnu vit eisini leggja okkurt eftir okkum, sum fólk kunnu lurta eftir.

Í gjárkvøldið skuldi vera útikonsert í Runavík saman við Týr og Diatribes í sambandi við eystanstevnuna, og varð hetta sostatt fyrsta konsertin aftaná fløguútgávuna.



*Clickhaze eru nú á gøtuni við teirra fyrstu fløguútgávu. Á fløguni eru seks løg, trý live og trý upptikin í studio*
*Mynd: Jens Kr. Vang*